## Løgfrøðingur til Kommunusamskipan Føroya

Kommunufelagið hjá stóru kommununum í Føroyum, KSF økir virksemið og sóknast tí eftir einum dugnaligum løgfrøðingi.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. at:**
- Fyrireika og ráðgeva limakommununum í málum av felags áhuga, t.d. viðgera hoyrings- og ætlannarskriv frá stjórnarráðunum, og mál av aðalregluligum týdningi fyri kommunurnar annars.
- Gera løgfrøðiligar útgreiningar og frágreiðingar til limakommunurnar.
- Arbeiða við at styrkja og samskipa kommunuumsitingarnar í KSF, m.a. við at gera felags vegleiðingar og mannagongdir.
- Ráðgeva limakommununum í serstøkum málum
- Virka við í skeiðum og øðrum mennandi virksemi, sum KSF hevur fyri limakommununum.
- Umboða KSF í arbeiðsbólkum.
- Samskifta við landsumsitingina, áhugabólkar og aðrar samstarvsfelagar hjá limakommununum.
- Savna og umsita vitan um kommunurættarlig viðurskifti

**Førleikakrøv og avbjóðingar**
- Løgfrøðiligt embætisprógv.
- Umsitingarligar ella aðrar samsvarandi royndir
- Kunnleika til kommunurætt og fyrisitingarerætt, eins og ein breið tilgongd til onnur lógarøki er ein fyrimunur.
- KSF er ein politiskur felagsskapur, politiskt tev er tí ein treyt fyri at kunna røkja starvið nøktandi, eins og hugurin at fáast við og meta um kommunupolitiskar spurningar - tó við størstu virðing fyri fakligheitini.
- Viðkomandi má hava evnini at fordjúpa seg í serstøk evni, men eisini kunna "hava fleiri bóltar í luftini í senn".
- Viðkomandi má evna at lyfta serstakar spurningar upp og viðgera teir á generellum støði, so viðgerðin gagnar heildini.
- Viðkomandi má hava evnini at bera felags stevnumið og leiðreglur inn í kommunufyrisitingarnar.

**Seturnarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. september ella soleiðis sum hóskar til uppsagnarfreist í einum verandi starvi. Lønin verður avtalað eftir fakligum førleika og royndum, við støði í sáttmálanum hjá Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

**Starvsstaður**
Skrivstovan liggur í Tórshavn. Roknast má við, at nakað av ferðing verður til limakommunurnar.

**Meira fæst at vita**
Um starvið við at venda sær til Ingibjørg Berg, aðalskrivara tlf. 322180 ella 213080. Starvsprofil og upplýsingar um KSF finnur tú á heimasíðuni www.ksf.fo

**Umsókn**
Umsókn skal saman við CV vera KSF í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. juni kl. 16.00 og sendast:

**Kommunusamskipan Føroya**
Lucas Debesargøta 6-8
Postboks 53
FO-110 Tórshavn

**Internet Sosialurin**
www.sosialurin.fo

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

## Lærari til timbur- og snikkaradeildina

Starvið, sum er eitt tíðaravmarkað fulltíðarstarv í 1 ár, umfatar undirvísing á timbur- og snikkaradeildini.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum bygningssnikkari ella húsasmiður, og viðkomandi starvsroyndir innan yrkið.

*Deildin undirvísir næmingum, sum læra til húsasmið, bygningssnikkara ella eru SIT-næmingar.*
*Á deildini starvast 5 faklærarar, umframt lærarar í almennum lærugreinum og 1 verkvørður.*

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landstýri og FTL.

Starvið skal setast 8. august 2005.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og viðmælum skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 13. juni 2005.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlan, tlf. 30 80 50

**Tekniski skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur75 • P.o.b. 239 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 308050 • Fax +298 316621
E-mail: tst@tst.fo

## Bátur til sølu

Vegna tørv á størri báti, verður báturin "Grønalíð" hervið lýstur til sølu.
Báturin er vælegnaður til nótafiskiskap eftir sild/brislingi á firðunum.
Tangin tekur 65 tons. Báturin hevur krana og kopp, kann eisini brúkast til útróður.Báturin hevur ikki fiskiloyvi.



*Áhugaði kunnu ringja til Hans Jacobsen Tel. 587499*

Alistøðin á Bakka,
625 Glyvrar

## Ørvur TN 149 til sølu v/fiskiloyvið




Báturin er frá 1985, motorur John Deer 225hk Árg. 2004.
4 DNG snellir og all nautisk útgerð. Mesta ferð 10 knob.

tele. 22 87 41

## Fólk søkist

til minni matvøruhandil í Havn. Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur royndir innan hetta yrki.

Arbeiðstíðir: Dagvakt aðru hvørja viku og morgunvakt aðru hvørja viku.

Skriva til Sosialurin, Box 76, FO-110 Tórshavn.

**Bill. mrk. 104**

## FA. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag $9^{00}$-$17^{00}$*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74

## Til sølu

Intruder 1400



**Droymir tú um eina veruliga motorsúkklu?**
**Nú hevur tú møguleikan!**

Fleiri myndir og upplýsingar á
**http:intruder1400.hopto.org**

**Telefon 21 19 20**

**Ring nú!**

**Størv**

## Kokkar



Strandfaraskip Landsins søkir eftir kokkum at byrja skjótast til ber.

Víst verður til heimasíðuna www.ssl.fo

REPROZ

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo • 34 30 30